Álit

í

løgtingsmáli nr. 64/2025: Uppskot til løgtingslóg um stuðul til at fyrireika, umvæla, útbyggja og nútímansgera Listasavn Føroya

Landsstýriskvinnan í uttanríkis- og mentamálum, Sirið Stenberg, hevur lagt málið fram 9. desember 2025, og eftir 1. viðgerð 17. desember 2025 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 6. og 9. januar 2026.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýriskvinnuna í uttanríkis- og mentamálum, Sirið Stenberg, saman við Listasavni Føroya og Landsverki.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Lógaruppskotið hevur til endamáls at geva Listasavni Føroya, okkara tjóðlistasavn, sum er skipað sum ein sjálvsognarstovnur, tilsøgn um ta fígging, sum ætlandi skal vera landsins partur av eini umvæling, útbygging og nútímansgerð av hølum savnsins.

Hetta verður til gagns fyri føroyingar og útlendsk vitjandi, bæði ferðafólk og almenn vitjandi. Barnafamiljur og ikki minst skúlabørn fáa serliga góðar umstøður í útbygdu hølunum við m.a. einum barnaverkstaði og læringsrúmi.

Savnið skal varðveita staðsetingina í viðarlundini, og byggjast skal m.a. ein sokallað "fjórða pyramida".

Í verkætlanarlýsingini síggjast ymsu atlitini til burðardygd, arkitektur, sum sømir seg einum listasavni, eins og lýsingar av brúksvirði hjá ymsu umvældu og umbygdu hølunum.

Samlaði kostnaðurin er mettur at vera 70,8 mió. kr. Danskir grunnar, tríggir í tali, koma við tilsamans 41 mió. kr., og Tórshavnar kommuna stuðlar við 5,5 mió. kr.

Uppskotið gevur landsstýrisfólkinum heimild at stuðla verkætlanini at fyrireika eitt nú lendisarbeiði, grevstur o.a., at umvæla, útbyggja og nútímansgera Listasavn Føroya við tilsamans 24,3 mió. kr. Íroknaðar eru tá:

- 2 mió. kr., sum vórðu játtaðar í 2023
- 2,5 mió. kr., sum vórðu játtaðar í 2024
- 4,5 mió. kr., sum vórðu játtaðar í 2025

Upplýst er, at umleið 1 mió. kr. vórðu nýttar í 2025, og at óbrúkt játtan á 3,5 mió. kr. tí verður framflutt til 2026.

Í 2026 eru játtaðar 3,5 mió. kr. til verkætlanina, og tøk játtan í ár er tískil 7 mió. kr.

Írestandi stuðulin av teimum tilsamans 24,3 mió. kr., sum er landsins partur, væntast at falla í 2027 og 2028.

Landsstýrisfólkið fær við hesum uppskoti eisini heimild at áseta treytir í tilsøgn um útgjald av stuðlinum, sum er vanligt.

Uppskotið gevur harumframt lógarheimild til at taka ímóti uttanhýsis figgingini, sum er játtað Listasavni Føroya.

Ein treyt hjá grunnunum fyri at stuðla er, at landið eisini stuðlar við eini upphædd.

Við hesum lógaruppskoti kunnu hesar treytir verða uppfyltar, og stuðul útgoldin frá grunnunum.

Arbeiðið skal eftir ætlan fara í gongd nú í 1. ársfjórðingi í 2026. Fyrireikingararbeiðið byrjaði í 2021, og í 2028 verður Listasavn Føroya ætlandi liðugt útbygt.

Undir hoyringini er komið fram, at tað gongur eftir vild við arbeiðinum, og at arbeiðstakarin, sum vann útboðið, er klárur at fara í gongd, og at freistin hjá savninum at taka av bindandi tilboðnum, er við at ganga út. So tað hevur skund at útvega landsins fígging og tær ymsu heimildirnar, so øll verkætlanin kann hava trygga fígging.

Nakað av rakstrarvøkstri kann væntast, tá savnið er útbygt, men eins og upplýst í lógaruppskotinum, so hava hoyringarpartar eisini nevnt ymsar møguleikar fyri at útvega fleiri inntøkur við teimum nútímansgjørdu hølunum.

Upplýst er fyri nevndini, at goymslan hjá Listasavni Føroya kann verða skipað saman við nýggju goymsluni hjá Tjóðsavninum, Innan Glyvur, har hóskandi bygningur nú ætlandi skal byggjast til slíkt endamál.

Ein samd nevnd heldur tað vera av sera stórum týdningi, at føroysk list fær hóskandi karmar í einum umvældum og um- og útbygdum Listasavni Føroya.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 26. januar 2026

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Ingilín D. Strøm
Dennis Holm	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	